# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Inga Simonsen 65 ár



Í dag 21. apríl verður Inga Simonsen, fødd Gunnarsson 65 ár. Inga er dóttir Herborg, fødd Joensen (1918-1997) og Gunnar Gunnarsson (1916-1992). Inga er næstelst av 5 systkjum. Hini systkini eru Sólvá, sum er gift Arna K. Olsen úr Rituvík. Sólvá býr beint norðanfyri Esbjerg. Jórun sum er gift Osmund Justinussen úr Leirvík. Gunnar yngra, sum er giftur Jancy Jacobsen úr Klaksvík. Yngsta systurin er Odvør, sum er gift Jógvani á Lakjuni úr Fuglafirði.

Inga er fødd í Vági meðan seinni heimsbardagi leikaði uppá tað harðasta. Havnin bleiv illa bumbað av týskum bumbuflogførum um hetta mundið, og tí var Herborg flýdd til Vágs at eiga. Herborg og Gunnar vuksu bæði upp í Vági. Barna og ungdómsárini vaks Inga upp úti í Mattalág. Leingi vóru húsini hjá Herborg og Gunnari millum tey ytstu húsini í Havnini. Tá ið Inga var liðug við Realskúlan fór hon í læru á Føroya Jarðarráði, har Hans Jákup Jacobsen (Heðin Brú) var stjóri. Heðin Brú skrivaði eina vakra yrking til Ingu táið hon var avlærd har. Sum skrivstovukvinna hevur Inga arbeitt bæði hjá Hanus Debes Joensen, gamla landslæknanum, hjá Føroya Landsstýri, Kongiliga Grønlendska Handlinum (1975-79), og síðstu nógvu árini á Menningarstovuni. Fyrst uppi við Hoyvíksvegin, og síðani á Bryggjubakka.

6. november 1965 giftist Inga við Árna Simonsen (1936-1999), sonur Marthu, fødd Joensen (1910-1995) úr Leirvík, og Sigurd R.F. Simonsen (1912-1994) úr Sandavági. Martha og Sigurd fluttu til Fuglafjarðar í 1938, og har vaks Árni upp barna og ungdómsár síni! Árni var næstelst av 9 systkjum. Árni var sjómaður øll árini frá 1949 líka til 1991 tá Parkinsonsjúkan noyddi hann at leggjast uppi á landi. Árni tók stýrimansprógv í 1960. Yrkisleiðin hjá Árna førdi Ingu og familjuna bæði til Esbjerg og til Manitsoq (Sukurtoppin) í Grønlandi. Ungdómsárini við síðutrolarunum har mong ein vaktin var brotin, og strævnu mandómsárini í Norðurhøvum tærdu uppá Árna, og í 1999 legði Árni árarnir inn aftaná 8 strævin ár, merkt av sjúku. Øll nærum 34 árini tey vóru gift var Inga honum ein góð kona. Inga er ung í skinni og sinni. Hon er teldusnillingur burturav, og er sera praktiskur fyriskipari. Hon viðlíkaheldur eina heimasíðu, og hjálpir einum trúboðarafelagsskapi við skrivligum arbeiði. Hennara unga sinni hevur hjálpt henni væl í tí stuðuli og hjálp hon hevur givið sangbólkinum "Salt".

Í 1966 og 1968 fekk Inga synirnar Marna og Hera. Marni er giftur Mai Laksáfoss úr Klaksvík. Tey eiga børnini Fríðu, Árna og Ingu. Marni er sjálvstøðugt vinnurekandi. Heri arbeiðir hjá Postverkinum. Inga er burturstødd føðingardagin.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Karl Mohr Johansen**, málarameistara úr Miðvági, fer av Ellisheiminum í Vágum leygardagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju sunnudagin kl. 14.

Tey, ið vilja minnast Karl Mohr, kunnu lata Miðvágs kirkju eina peningagávu. Konta í Føroya Sparikassa.

Kistan við **Miu Petersen,** Fámjin, fer til Suðuroyar við Smyrli leygarkvøldið kl. 20. Bønarhald verður í kapellinum á Landssjúkrahúsinum leygarkvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður frá Salem á Tvøroyri sunnudagin kl. 13.

Tey, ið vilja minnast Miu, kunnu lata eina peningagávu til Traktatgrunnin. Konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust meg á 70 ára føðingardegnum og gjørdu mær dagin hugnaligan, takki eg hjartaliga. Tøkk fyri blómur, gávur og uppringingar.

**Blíðar heilsanir**
**Sigfríður Joensen**
**740 Hvannasund**

## Dagurin

**22. apríl. Cajus.** Pávi, sum doyði í árinum 296.
*Fríðrikur Petersen varð føddur hendan dagin í 1853*

**23. apríl. Georgius**, deyður umleið ár 300. Halgisøgan sigur, at hesin kristni riddarin feldi ein dreka og bjargaði kongsdóttrini har í staðnum. Hann varð seinni tikin av døgum fyri trúar sakir. Dagurin er valdur til almennan skótadag um allan heim.

Grikska navnið merkir *hann sum dyrkar jørðina.*

**24. Albertus**, deyður umleið ár 997. Biskupur í Prag. Týska navnið merkir *ediligur* ella *lýsandi*.

## Prógv

Tann 9. mars fekk Halgerð M. Højgaard, úr Leirvík, prógv sum kosmetolog á Heidi Sommer International training academy í Kolding.

## 90 ár

Sunnudagin 23. apríl verður Maria Frederikka Nielsen, ættað av Skála, búsitandi í Havn, 90 ár.

## 80 ár

Sunnudagin 23. apríl verður Selma Poulsen, Tvøroyri, 80 ár. Hon er burturstødd.

## 75 ár

21. apríl verður Martha Poulsen, Undir Heygnum 28, Tórshavn, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
og hjálpsemi, tá maður og pápi okkara

**Jóannes Stakkslíð**

brádliga andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, ið sendu blómur, kransar
og peningagávur.
Tøkk til øll, sum fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til floksfelagarnar og lærarar
á Studentaskúlanum í Hoydølum,
bilstøðina Bil og tykkum, sum hjálputu til
í sambandi við jarðarferðina.
Eisini vilja vit takka Bergi Debes Joensen, presti,
berarum, sangarum og urguleikara.

*Familjunnar vegna*
**Birna, Fríðgerð og Tórhild**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum sum sýndu samkenslu
tá kæra kona mín, mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Ketty Joensen**
Árnafjørður

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum øll ið fylgdu úr kapellinum
og frá kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til kirkjuna.
Tøkk til starvsfólkið í Niðrustovu á
Norðoya Røktarheimi fyri góða umsorgan.
Tøkk til Niels Paula, Hans Eiler og Hanus,
kirkjutænarar, sangarar og gravarar,
og øll tykkum, sum á ymiskan hátt hjálpu til
í sambandi við jarðarferðina.

*Familjunnar vegna*
**Jógvan Svend**